# MASKINMEISTARIN

Nr. 3 / Desember 2017




## YNSKI UM SHIPPING-ÚTBÚGVING Í FØROYUM




Nýggj góðkenning av køliveitarum



Sett gamlan dampara í stand



Maskinmeistaraútbúgvingin: Fyrstu aspirantarnir byrja í summar

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Jóan Petur Patursson

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda MASKINMEISTARAN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MASKINMEISTARANUM, tá keldan verður upplýst. MASKINMEISTARIN kann heintast í PDF á heimasíðuni hjá felagnum: www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
*Farmaskip:*
Grækaris D. Magnussen
*Wilhelm E. Petersen:*
Ingolf S. Olsen
*Dampketil:*
Øssur Winthereig
*Sjakkið:*
Myndaánari: Klæmint Jacobsen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting, prent og liðugtgerð**
Estra 478500

Upplag: 800

# INNIHALD

Ynski um shipping-útbúgving í Føroyum ............ 5
Nýggj góðkenning av køliveitarum ...................... 11
Maskinmeistaraútbúgvingin:
Fyrstu aspirantarnir byrja í summar .............. 16
Nógvir maskinmeistarar arbeiða í landi ............... 20
Formansval fyri framman ..................................... 20
Skatta-FAS fer í søguna ....................................... 20
Sett gamlan dampara í stand ............................... 22
Pensjónslívið fyri framman
– hundurin gleðir seg .......................................... 27
Skemt og viðmerking ........................................... 28
Føðingardagar og jólaheilsan............................... 30
Maskinmeistarafelagið:
Tíðindi ................................................................ 31










# Vit hava álit á Skipaeftirlitinum

Síðani uppskotið til nýggja fiskivinnulóggávu gjørdist alment, hevur ikki trótað við hørðum atfinningum. Onkrar sakligar, aðrar minni sakligar.

Millum tær minni sakligu er dómadagsprofetiin um, at okkara floti um skamma stund fer at vera ein køstur við dunkum og dangum.

Hetta siga mótstøðufólk í vinnuni, og hetta siga politikarar, ið ikki vilja vita av ætlaðu nýskipanini. Eisini fakfelagsformenn við stokhólmssyndromi sjabba upp í saman um hesa vanlukku, sum er í væntu.

Felags fyri hesar dómadagsprofetar er, at teir absolutt onga virðing hava fyri okkara Sjóvinnustýri og enn minni álit á Skipaeftirlitinum. Tí tað er Skipaeftirlitið undir Sjóvinnustýrinum, sum skal góðkenna øll skip, sum koma í flotan og undir føroyskt flagg, og tryggja, at øll skip – eisini tey, sum møguliga fara at koma í flotan orsakað av fiskivinnunýskipanini – eru í tí standi, sum lógir og reglur áseta.

Men Maskinmeistarafelagið hevur fult álit á Skipaeftirlitinum, og at tað fer at megna hesa uppgávu, sum tað so fyrimyndarliga hevur megnað higartil. Hví skuldi tað ikki tað?

Og tá tað nú verður tosað so nógv um dunkar og dangur, so er vert at viðmerkja, at miðalaldurin á føroysku fiskiskipunum í verandi flota er eini 30 ár ella gott tað.

Men takkað verið okkara góða eftirliti og strongu altjóða krøvunum, sum eisini okkara floti skal lúka, eru øll føroysk skip, ung sum gomul, sum eru í vinnu, í fínum standi.

Lukkuvís eru tað ikki politikarar og fakfelagsformenn, ið standa fyri eftirlitinum. Vóru tað tað, høvdu vit við vissu sæð dunkar og dangur.

**Páll Hansen**
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*



# SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

## VINNUHÁSKÚLIN

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- SSO-skeið
- § 16-skeið
- ISPS-skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety-skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS-skeið
- LRC-skeið
- GOC-skeið og endurnýggjan
- DP Basic/induction
- DP Advanced/Simulator
- DP endurnýggjan
- AIS
- Tankers familiarisation
- Háspenningsskeið maskinmeistarar
- Háspenningsskeið maskinistar

## TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- FRC-grundskeið
- Bátaføraraskeið
- Medisinsk fyrstahjálp
- Stroppaskeið

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum við broytingum frá 2010.
Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING







# Ynski um shipping-útbúgving í Føroyum

**Skulu vit hava meira avleitt virksemi frá sjóvinnuni í Føroyum er neyðugt at gera meira við shipping-vinnuna. Ein háttur er at skipa fyri serligari shipping-útbúgving í Føroyum. Tað var ein av niðurstøðunum í álitinum um sjóvinnu í 2017**

**TEKSTUR & MYNDIR:**
GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN / grakaris@press.fo

Teirra millum, sum við jøvnum millumbili hevur víst á tørvin og møguleikan at vaksa um føroysku shipping-vinnuna, er formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen. Hann heldur, at rættast hevði verið at farið undir eina serliga shipping-útbúgving í Føroyum. Eina útbúgving, har eisini maskinmeistarar og til dømis skipsførarar kundu útbúgvið seg á økinum, og á tann hátt fingið arbeiði í landi.

– Samstundis kundi sjóvinnan givið meira avleitt virksemi á landi, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen.

Stjórin í Sjóvinnustýrinum, Hans Johannes á Brúgv, hevur eisini víst á, at stórir møguleikar eru í shipping-vinnuni, møguleikar, sum nógv meira kann gerast burturúr, enn gjørt verður í dag.

– Aðrastaðni er shipping-vinnan ein stór vinna, men tað er hon ikki í Føroyum. Hinvegin meti eg, at vit hava góðar møguleikar at gera nakað við hesa vinnuna í Føroyum. Her liggja stórir, ótroyttir menningarmøguleikar hjá okkara væl útbúna sjófólki. Á sjóvinnuøkinum vita føroyingar



SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Hans Johannes á Brúgv,
*forstjóri*

## Stjórans frágreiðing

Fremsta uppgávan hjá Sjóvinnustýrinum er støðugt at betra um trygdina á sjónum, verja umhvørvið og at tryggja rættindini hjá viðskiftafólki okkara. Arbeiðið at náa hesum endamáli er skipað í einum avrikssáttmála við Uttanríkis- og Vinnumálaráðið, sum verður endurnýggjaður ár undan ári. Í hesum ársriti vilja vit greiða frá virksemi okkara í 2015, sum m.a. hevur fevnt um niðanfyristandandi átøk.

Í sambandi við at STCW sáttmálin frá Manila 2010 kemur í gildi 1. januar í 2017, var neyðugt at broyta manningarlógina og lýsa nýggja kunngerð um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum samsvarandi hesum reglum. Hetta hevði við sær, at allir føroyskir yvirmenn við prógvi frá áðrenn 2006 skuldu á skeið. Broytingin í lógini hevur samstundis við sær, at umleið 3000 føroyingar skulu endurnýggja sær sjóvinnubrøvini. Sjóvinnustýrið kunnar so við og við um broytingina og hevur brynjað seg til uppgávuna.

Í 2014 og 2015 varð eftirlit við trygdarvenjingum um borð á føroyskum fiskiskipum raðfest. Eftirlitsfólk hjá Sjóvinnustýrinum vóru um borð á 56 skipum og gjørdu venjingar hetta tíðarskeiðið. Eisini eftirlit við ali- og brunnbátum varð raðfest í 2015.

Í apríl varð avtala gjørd við Den Maritime Havarikommission Danmark, um at teir gera kanningar

Umframt eftirlit við mynstringum á skriviborðinum verða trygdarkanningar gjørdar í samstarvi við Vørn og Arktisk kommando sum javnan ger kanningar umborð á skipum í føroyskum sjóøki. Harafturat koma trygdarkanningarnar, sum Sjóvinnustýrið ger við bryggju. Kanningarnar hjá Sjóvinnustýrinum fevna um trettan ymisk øki. Kannað verður millum annað, um siglingarloyvið er í lagi, um trygdarútgerðin verður hildin við líka og undir skipaðum treytum. Kannað verður eisini, um mánaðarligar trygdarvenjingar verða gjørdar umborð og líknandi.

Eisini hevur Sjóvinnustýrið gjøgnum 2015 góðkent undirveitarar í samband við ISO góðskustýring. Vist verður til lista á heimasíðu okkara. Javnstøðuavtala við Danmark, sum javnsetur føroysk sjóvinnubrøv og onnur prógv við donsk, er dagførd og nýggja avtalan verður undirskrivað á vári 2016.

Eftir langa viðgerð varð málið viðvíkjandi garnaskipinum Anitu beint til fútan í november mánaði.

Gamla sjóvinnubrævaskipanin er ikki nútíðarhóskandi. Tí hevur Sjóvinnustýrið keypt nýggja skipan. Nýggja skipanin er ein web-skipan, har umsøkjarin avgreiðir sína umsókn á alnótini. Skipanin verður klár at taka í brúk á sumri 2016.

*Føroyingar hava møguleikar at skapa eina shipping-vinnu á landi við menningarmøguleikum, eitt nýtt fíggjarligt bein at standa á, sigur Hans Johannes á Brúgv*

veruliga, hvat tingini snúgva seg um. Eg haldi tað vera rætt at menna okkum á teimum økjum, vit frammanundan vita nakað um. Okkum nýtist ikki altíð at byrja á berum ella bróta upp úr nýggjum. Vit kunnu í staðin menna okkum á økjum, har vit frammanundan er væl fyri, heldur Hans Johannes á Brúgv.

Hann er samdur við formannin í Maskinmeistarafelagnum um, at gott hevði verið við eini serligari útbúgving, sum kundi givið neyðugu eyka førleikarnar at arbeitt í einari føroyskari shippingvinnu.

### Eitt eyka bein

Longu í ársritinum hjá Sjóvinnustýrinum fyri 2015 vísti Hans Johannes á Brúgv á avleiddu møguleikarnar, sum shippingvinnan hevur. Hann sigur í frágreiðingini millum annað, at hóast nærum øll skip í FAS eru útlendsk, so eru feløgini handan skipini føroysk. Tað er eisini krav í FAS.

– Hetta hevur givið møguleikar hjá føroyingum at skapa eina shipping-vinnu á landi við menningarmøguleikum. Í Danmark fekk hendan spírandi vinna heitið "Det Blå Danmark" í síni tíð. Nøkur føroysk feløg bjóða í dag ymsar tænastur í FAS. Hesi umsita upp til 300 mans og tilrættisleggja mynstringar og ansa eftir



Framhald á næstu síðu >>

*Møguleikar eru at skipa eina nýggja shipping-útbúgving í Føroyum, og fleiri vísa á, at Glasir kundi tikið sær av einari slíkari útbúgving*



skjølum í *crewing*. Aðrar tænastur, sum hesi feløg kunnu bjóða, eru bókhald og roknskapur hjá føroyska felagnum hjá reiðarínum, lønargjaldingar og samskifti við myndugleikarnar. Sostatt er avleitt virksemi í FAS longu ein týðandi vinna í Føroyum, sigur Hans Johannes á Brúgv í ársritinum.

Stjórin í Sjóvinnustýrinum sigur eisini í ársritinum fyri 2015, at ein blómandi shipping-vinna gevur ringvirkningar í samfelagnum.

– Tænastur skapa arbeiðspláss og soleiðis eitt nýtt bein hjá føroyska búskapinum at standa á. Ikki minst er hetta eitt øki, sum føroyskir yvirmenn hava verið brúkarar av í nógv áratíggju. Tí hava føroyingar eina vitan frá brúkarasíðuni, sum er eitt stórt virði fyri vinnuna. Møguleiki er sostatt at skapa arbeiðspláss fyri skipsyvirmenn, sum ynskja at arbeiða á landi, sigur altso stjórin í Sjóvinnustýrinum, Hans Johannes á Brúgv.

### Hægri útbúgvingar

Í álitinum *Sjóvinna – sjóvinnupolitikkur 2017* verður eisini nomið við shipping-vinnuna sum avleitt virksemi frá sjóvinnuni:

*Logistikk førleikin er vaksandi í føroyskum vinnulívi, men førleikar vanta serliga innan tað kommersiella økið t.d. shipping, og tað kann vera ein týðandi orsøk til, at shipping vinnan ikki hevur størri vøkstur í Føroyum. Tí er neyðugt at skipa útbúgvingar og skeið, í eru málrættað til hetta økið.*

Arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt álitið *Sjóvinna – sjóvinnupolitikkur 2017* vísir á nøkur øki, sum eru neyðug at styrkja um maritimu og handilsligu førleikarnar. Her vísa tey beinleiðis á, at neyðugt er at skipa logistikk/shipping-útbúgving:

*Miðnámsskúlar og handilsskúlar skulu bjóða breytir og útbúgvingar út innan shipping og logistikk, umframt miðnámsskeið (Gymnasialt Supplerings Kursus). Og at skipa logistikk/shipping-útbúgving (eitt ella tvey ár) til tey, ið hava miðnám ella skrivstovu-útbúgving.*

Í álitinum mæla tey eisini til at fara undir masterútbúgvingar, til dømis master í shipping til skipsførarar. Víst verður á, at ein fortreyt fyri, at sjóvinnan og avleitt virksemi gerst ein týðandi vinnugrein, er, at vit leggja okkum eftir at útbúgva arbeiðsmegi soleiðis, at arbeiðsmegin hevur røttu førleikarnar til størv innan hesar vinnugreinar, og soleiðis kann vera við til at menna føroyskt vinnulív:

*Til tess krevjast dygdargóðar og viðkomandi maritimar útbúgvingar og skeið á øllum stigum. Umráðandi er, at útbúgvingar og skeið støðugt verða lagað til soleiðis, at tey innihaldsliga samsvara við altjóða krøv (frá IMO), og at tey fylgja altjóða stigsetingum (Bologna), og at hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við vinnuna.*

Arbeiðsbólkurin sigur, at Føroyar sum sjóvinnutjóð burturav eiga at vera í fremstu røð innan maritimar útbúgvingar. Tí er alneyðugt at hava eina greiða ætlan fyri hesar útbúgvingar.

### Neyðugt við útbúgving

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, sigur við *Maskinmeistaran*, at skulu vit til dømis menna FAS og hava meira avleitt arbeiði á landi, er beinleiðis neyðugt við einari shipping-útbúgving.

– Aðrastaðni hava tey slíkar útbúgvingar, eisini altjóða útbúgvingar, til dømis er ein altjóða shipping-útbúgving í Singapor. Shipping-útbúgvingar hava tey eisini í til dømis



*Vit eiga at menna shipping-vinnuna soleiðis, at vit fáa meira avleitt arbeiði frá sjóvinnuni – í landi*

Danmark og Noregi, vísir Páll Hansen á.

Hann heldur, at vit í Føroyum hava lítið ella onki veruligt shipping-virksemi, har vit taka okkum av marknaðinum úti í heimi, tað er til dømis farmauppgávur í útlondum.

– Tær shipping-skrivstovurnar eru aðrastaðni, og tær hava eisini væl útbúgvið fólk. Slíkar shipping-skrivstovur kundu vit sum onki eisini havt í Føroyum. Tí eiga vit at syrgja fyri, at fyritreytirnar koma upp á pláss, og her er tað, at shipping-útbúgvingin er ein rættur vegur at ganga, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

## Fleiri møguleikar

Í sambandi við tosið um møguliga shipping-útbúgving vísir Páll Hansen til handilsligu útbúgvingarnar á Glasi. Finn Jensen, sum er dekanur fyri hægri útbúgvingar á Glasi, sigur, at hann er vitandi um ynskið hjá pørtum av vinnuni um shipping-útbúgving, og hann veit eisini, at partar í vinnuni hava tosað saman um hetta.

Hann vísir á, at ein møguleiki er at skipa eina fulltíðarútbúgving í shipping, ein annar møguleiki er at hava partstíðar útbúgving ella skeið. Hinvegin er tað eitt stórt arbeiði at stápla eina nýggja útbúgving upp á beinini.

– Ein triði møguleiki er at skipa eina akademiútbúgving í logistikki, eina sonevnda logistikkøkonom-útbúgving. Vit hava frammanundan akademiútbúgvingar á Glasi, so tað hevði borið væl til. Tá er spurningurin, hvussu stórur áhugin er fyri útbúgvingini, altso talið av næmingum. Tá er ikki talan um eina beinleiðis shipping-útbúgving, men um eina útbúgving í logistikki og økonomi, sigur hann.

Vit hava fleiri ferðir vent okkum til Mentamálaráðið um hetta málið. Vit hava millum annað spurt – skrivliga – hvørjar hugsanir ella møguligar ætlanir tey hava um eina slíka útbúgving, ella um tey yvirhøvur hava havt eitt tílíkt mál uppi at venda, men haðani er onki svar komið.









# Vit tryggja orku til vinnulívið

Við okkara royndum, vitan og førleikum tryggja vit orku til húsarhaldini, stovnar og vinnuna.

Kring landið hava vit bensinsølustøð og Fast-handlar.

Skipini bunkra hjá okkum í best útgjørda terminali í Norðuratlantshavi.

Og hvørja ferð eitt flogfar lyftir seg upp frá vøllinum í Vágum, hevur tað frammanundan tikið brennievni frá okkum.

føroya orkufelag

Tel 34 35 00 www.effo.fo

Volkswagen

# Tiguan Allspace.



**Tann fullkomni familjubilurin.**
Tiguan Allspace kemur við 7 setrum og einum hópi av plássi — og er á goymslu á Bilasøluni.

Prísur úr 387.000,-

Bilasolan.fo

Bilasølan
Vegurin langi, 359700




*Umleið 90 trýstberandi anlegg eru í Føroyum – harav 30 dampkeltlar*

# Nýggj góðkenning av køliveitarum

**Einki krav verður í nýggjari kunngerð um, at bert føroyskar fyritøkur kunnu løggildast at seta køliannlegg upp í Føroyum. Felagið fyri løggildar køliveitarar ynskir, at bert fyritøkur skrásettar í Føroyum skulu arbeiða við køliútbúnaði í Føroyum**

TEKSTUR & MYNDIR:
ØSSUR WINTHEREIG, PRESS

Nýggjar kunngerðir eru á veg, sum skulu áseta, hvørji krøv skulu setast til virki, sum arbeiða við trýstberandi útbúnaði á landi. Tað eru køliannlegg og dampketlar. Øll krøvini, sum áður hava verið slødd í fleiri ymiskum kunngerðum, verða nú savnað í einari kunngerð.

Eisini verða nú neyvari reglur gjørdar fyri krøvunum til køli– og frystiútbúna og hvør skal gera eftirlitið.

Fyri at kunna arbeiða við køliannleggum yvirhøvur krevst løggilding.

Og í hesum viðfangi verður eisini gjørd nýggj kunngerð um løggilding av køliveitarum, ið kunnu arbeiða við køli– og frystianleggum, og sum kunnu vera løggildir samstarvspartnarar hjá Arbeiðs– og Brunaeftirlitinum.

Higartil hevur verið arbeitt eftir eini vegleiðing frá 2006, men nú skal løggilding lýsast í kunngerð. Løggilding av køliveitarum hevur higartil verið gjørd av eini førleikametingarnevnd, men ætlanin er nú at leggja hesa løggilding hjá Arbeiðs– og Brunaeftirlitinum.

– Okkum hevði dámt betur, um løggildingin lá hjá Maskinskúlanum, tí har eru allir førleikar savnaðir, heldur Petur Egholm, formaður í felagnum Føroyskir Løggildir Køliveitarar.

Arbeiðið at løggilda køliveitarar byggir á eina meting av, um ein persónur hevur royndir og førleikar at arbeiða við køli– og frystiútbúnaði. Tað ber til at útbúgva seg til køliveitara uttanlands. Ætlanin var einaferð, at Maskinskúlin skuldi hava eina útbúgving fyri kølimontørar, men talið á áhugaðum var ov lítið.

*Framhald á næstu síðu >>*

*Í nýggju kunngerðini um løggilding av køliveitarum krevst, at køliveitarin er 18 ár, hevur neyðuga útbúgving ella hevur neyðugar førleikar*




## Eftirlitið datt niður fyri

– Alt hetta eftirlitsarbeiðið við køli– og frystiútbúnaði datt niður fyri í tíðarskeiðnum frá 2006 til 2011, tí so nógvar sparingar vórðu gjørdar á Arbeiðseftirlitinum, sigur Leivur Persson, stjóri á Arbeiðs– og Brunaeftirlitinum. Tað endaði við, at nógvar uppgávur vórðu ikki loystar. Eitt nú datt eftirlitið við trýstberandi útbúnaði niðurfyri.

Fyri nøkrum árum síðani var aftur farið undir at uppbyggja lógarkravda eftirlitsarbeiðið. Í dag verður á leið eitt árverk á Arbeiðs– og Brunaeftirlitinum brúkt til arbeiði við trýstberandi útbúnaði.

Eftirlitið fevnir um nógv ymisk køli– og frystianlegg. Í alt eru eini 60–70 annlegg við úr nøkrum fáum hundrað kilo av amoniakk í upp í anlegg við 30 tonsum. Harafturat fevnir eftirlitið eisini um dampketlar. Í Føroyum eru einir 30 virknir dampketlar.

## Felagsreglur við ES

Leivur Persson heldur, at tað fer at koma væl við hjá øllum, sum arbeiða við køli– og frystiútbúnaði, at reglurnar í Føroyum og Danmark – og har við eisini ES – verða eins.

Higartil hava reglurnar verið so gamlar og ótíðarhóskandi, at føroyski myndugleikin ofta hevur hildið seg til donsku reglurnar.

– Longu nú biðja vit virki projektera eftir donsku reglunum, tí somu reglur koma í næstum at galda hjá okkum, sigur Leivur Persson.

Eftirlitsarbeiðið hjá Arbeiðs– og Brunaeftirlitinum er regluligar vitjanir á teimum sløku 100 støðunum, sum hava trýstberandi útbúna.

Í fyrsta lagi skal projekteringin av anlegginum undangóðkennast. Í øðrum lagi skal eftirlitið góðkenna, at alt er bygt í tráð við projekteringina og sett rætt upp, áðrenn útgerðin kann setast til. Og í tí sambandinum skal útgerðin eisini trýstroynast.

Í triðja lagi er eitt krav, at virkið hevur ein løggildan køliveitara, sum eina ferð um árið fer gjøgnum útgerðina. Samstundis er eisini krav, at um umvælingar ella smáar broytingar skulu gerast, at tað er ein løggildur køliveitari, sum stendur fyri tí arbeiðinum.

Í hesum triðja førinum er tað Arbeiðs– og Brunaeftirlitið, sum hevur eftirlit við, at ein løggildur veitari er knýttur at virkinum og ger tey árligu eftirlitini.

## Útveiting av eftirliti

Felagið fyri Løggildar Køliveitarar, FLK, hevur gjørt var við, at í eftirlitsarbeiðinum eru eisini møguleikar fyri útveiting.

Í Danmark er júst leikluturin hjá arbeiðseftirlitinum útveittur at hava eftirlit við, at løggildir køliveitarar eru knýttir at einum virki, og tað er eisini eitt privat



Framhald á næstu síðu >>



*Petur Egholm, formaður í Føroyskum Løggildum Køliveitarum*

felag, sum stendur fyri árligu eftirlitunum vegna danska arbeiðseftirlitið.

– Vit halda, at stórt sæð allar eftirlitsuppgávurnar kundu verið útveittar, men ikki til eitt felag, sum sjálvt hevur fíggjarlig áhugamál, í at ávísar broytingar verða gjørdar, men til eitt eftirlitsfelag, ið bara hevur ta uppgávuna, sigur Petur Egholm, formaður í Felagnum fyri Løggildar Køliveitarar.

Petur Egholm sigur seg stúra fyri, at eftirlitið aftur kann detta niðurfyri, um politisk krøv aftur verða sett til sparingar.

Leivur Persson heldur ikki, at eftirlitsuppgávan skal útveitast.

– Summar uppgávur eru so grundleggjandi í mun til trygd, og avleiðingarnar av manglandi trygd kunnu verða so oyðileggjandi, at eg haldi tað almenna má inn at taka ábyrgd. Tað krevur heldur ikki so øgiliga nógva orku hjá okkum at tryggja, at øll trýstútgerð í landinum er í forsvarligum standi, sigur Leivur Persson.

– Vit halda okkum hava røttu førleikarnar, og vit eru myndugleikin á økinum, tí halda vit tað vera skeivt at útveita myndugleikaarbeiðið, sigur Leivur Persson. Men nú fara kunngerðirnar til hoyringar, so má politiski myndugleikin taka endaliga støðu.

## Føroysk løggilding

Ein onnur broyting, sum er á veg, er, at tað bert verða føroyskt løggildir køliveitarar, sum kunnu seta køliútbúna upp. Higartil hevur einki krav verið um føroyska løggilding fyri at projektera ella seta útgerðina upp.

– Hetta hevur verið ein ósemja millum okkum í Felagnum fyri Løggildar Køliveitarar, um tað er rætt at einki krav er um løggilding fyri uppseting av køliútgerð, men nýggju kunngerðirnar loysa part av hesi ósemjuni, tí nú verður tað eitt krav, sigur Leivur Persson.

Hetta hevur merkt, at útlendskar fyritøkur eru komnar til Føroya at seta útgerð upp, men hava ikki kunnað staðið fyri eftirliti, umvælingum og viðlíkahaldi, tí sambært stjóranum á Arbeiðs– og brunaeftirlitinum er longu nú lógarkrav, at umvælingar og viðlíkahald



*Leivur Persson, stjóri á Arbeiðs– og Brunaeftirlitinum:*
*Eftirlitið við køliútbúnaði liggur best hjá Arbeiðs– og brunaeftirlitinum*

skulu gerast av føroyskt løggildum køliveitarum.

Petur Egholm heldur lítið um verandi støðu, at øll útlendsk feløg sleppa til Føroya at seta útgerð upp, og so skulu føroysku køliveitararnir taka yvir.

– Útlendskar fyritøkur skulu hava bústað í Føroyum og eisini gera restina av arbeiðnum. Tað ber ikki til, at føroyskir køliveitarar bara skulu gera eldsløkking, sigur Petur Egholm.

– Vit koma ferð eftir ferð út fyri at skulu taka upp eftir útlendskum virkjum, sum komu hendan vegin at seta køliannlegg upp, og so eru virkini burtur aftur, sigur Petur Egholm.

Hann heldur, at eitt annað krav í kunngerðini um løggilding skal vera, at bara virki ella feløg, sum hava bústað í Føroyum, skulu kunna løggildast.

Men stjórin á Arbeiðs– og Brunaeftirlitinum hevur ikki hetta kravið í sínum uppskoti til løggilding.

– Vit skjóta upp, at eisini fyritøkur við heimstaði uttanlands kunnu arbeiða í Føroyum, men útlendskar fyritøkur skulu gjøgnum eina føroyska løggilding. Fyri okkum er tað ein spurningur, um trygdin er í lagi. Um ætlanin er at forða útlendskum fyritøkum at arbeiða í Føroyum, so eiga politikararnir at taka sær av tí, heldur Leivur Persson.

Stjórin á Arbeiðs– og brunaeftirlitinum væntar, at nýggju kunngerðirnar koma í gildi fyrst í 2018.







*– Nú fara vit at kunna meira um aspirantútbúgvingina til maskinmeistara og lýsa við henni, og tá vænti eg avgjørt, at áhugin verður stórur, sigur Wilhelm E. Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum*

## Maskinmeistaraútbúgvingin:

# Fyrstu aspirantarnir byrja í summar

**Vinnuháskúlin brúkti ikki orku upp á at kunna um maskinmeistara-aspirantútbúgvingina í summar, tí byrjanarflokkurin var at kalla fullteknaður. Men næsta summar væntar stjórin á Vinnuháskúlanum, at gongd kemur á**

TEKSTUR & MYNDIR:
INGOLF S. OLSEN – PRESS

Aspirantútbúgvingin til skipara hevur nú verið á tímatalvuni hjá Vinnuháskúlanum síðani á sumri 2015, og næsta summar byrja teir fyrstu maskinmeistaraaspirantarnir upp á sína útbúgving.

Aspirantútbúgvingin til maskinmeistara fór í veruleikanum av bakkastokki í summar, men teir tveir næmingarnir, sum høvdu teknað seg, møttu ikki upp, tá til stykkis kom.

Men laka byrjanin í summar kom tó ikki óvæntað á Wilhelm E. Petersen, stjóra á Vinnuháskúlanum.

– Vit søgdu bara, at tað bar til at tekna seg, tí útbúgvingarætlanin var klár, og Mentamálaráðið hevði formliga góðkent ta skipanina, sum vit skutu upp. Men vit gjørdu lítið og onki við at lýsa við tí, tí tað vóru nóg mikið av næmingum tilteknaðir at byrja á vanligu maskinmeistaraútbúgvingini. Tað komu eisini bert nakrir leysir fyrispurningar um aspirantútbúgvingina, og teir báðir, sum teknaðu seg til hana, møttu ikki upp, sigur hann.

### Væntar stóran áhuga

Hann ber tó ongan ótta fyri, at søgan endurtekur seg næsta summar.

– Nú fara vit at kunna meira um útbúgvingina og lýsa við henni, og tá vænti eg avgjørt, at áhugin verður stórur. Aspirantútbúgvingar til maskinmeistara hava virkað væl aðrastaðni runt um í heiminum í nógv ár, og tað hevur verið eitt ynski í nógv harrans ár at fáa hesa útbúgving í lag í Føroyum.

– Maskinmeistaranæmingarnir eru higartil komnir inn sum annaðhvørt handverkarar ella við eini SIT (støðisútbúgving innan tøkni, red.). Tað hevur verið á leið helvt um helvt. Men at taka SIT'arar inn hevur ikki rættiliga verið í samsvar við kunngerðina um maskinmeistaraútbúgvingina. Tí hevur tað eisini verið eitt ynski frá myndugleikunum at fáa skipað útbúgvingina betur og við eini aspirantskipan heldur enn at brúka SIT sum atgongd. So líðandi fara teir næmingarnir at verða avloystir av aspirantum, sigur Wilhelm E. Petersen.

### Intensiv útbúgving

Aspirantútbúgvingin til skipsførara tekur hálvt fjórða ár, og kravið fyri at sleppa undir ta útbúgvingina er útbúgving á miðnámsskúlastøði, sum vanliga tekur tvey ella trý ár.

Aspirantútbúgvingin til maskinmeistara fer at taka hálvt fjórða ár. Eisini her verður miðnámsútbúgving kravd, og fyrsta árið í apirantútbúgvingini skulu næmingarnir á verkstaðsskúla. Síðani er starvsvenjing í eitt hálvt ár – eitt semestur – har skift verður ímillum starvsvenjing umborð á skipi og virki á landi, tveir mánaðir í senn í hvørjum stað. Eftir fyrsta starvsvenjingartíðarskeiðið skulu næmingarnir á skúlabonk í trý semestur – hálvt annað ár – har teir fylgja skúlagongdini saman við næmingunum á vanligu maskinmeistaraútbúgvingini. Eftir hetta er aftur starvsvenjing í eitt semestur, og seinasta árið er teoretisk undirvísing í skúlanum.

– Aspirantútbúgvingin er effektiv, men hon er eisini krevjandi. Tað er galdandi fyri bæði navigatørútbúgvingina og maskinmeistaraútbúgvingina. Tú skiftir ímillum starvsvenjing og skúlagongd, og tað er rættiliga intensivt. Men hinvegin lærir tú ótrúliga nógv í senn, sigur Wilhelm E. Petersen.

### Prógv og vinnubræv

Tá tey fóru undir at snikka aspirantútbúgvingina til maskinmeistara saman á Vinnuháskúlanum, varð avgjørt at halda seg til somu meginreglur sum í aspirantútbúgvingini til skipsførara.

– Tá útbúgvingin er liðug, skal næmingurin bæði hava eitt prógv og eitt vinnubræv. Og fyri at fáa vinnubræv sum maskinmeistari umborð á skipi skalt tú hava seks mánaðar effektiva siglingartíð við skipi, sum hevur maskinorku á 3000 kilowatt ella meira.

Júst vinnubrævið til skipstænastu kann hugsast at lokka fleiri



*Framhald á næstu síðu >>*




*Soleiðis er aspirantútbúgvingin til maskinmeistara skipað. (Mynd úr útbúgvingarfaldara hjá Vinnuháskúlanum)*

Aspirantútbúgvingarnar eru skipaðar í aspirantkunngerðini, "Kunngerð um starvsvenjing hjá skiparum, skipsførarum, maskinmeistarum og maskinistum undir útbúgving". Um starvsvenjingina hjá maskinmeistaraaspirantum er ásetingin soljóðandi:

§ 4. Starvsvenjing í sambandi við útbúgving sum maskinmeistari skal fara fram á skipi við framtøkumegi á 3000 kW ella meira. Ein maskinyvirmaður skal virka sum vegleiðari.

Stk. 2. Starvsvenjing í sambandi við útbúgving sum maskinist kann fara fram á skipi við framtøkumegi á 750 kW ella meira. Ein maskinyvirmaður skal virka sum vegleiðari.

Stk. 3. Samlaða starvsvenjingin í sambandi við maskinmeistaraútbúgvingina og maskinistútbúgvingina skal vera 12 mánaðir, harav í minsta lagi 6 mánaðir skulu verða umborð á skipi.

Stk. 4. Næmingur í maskinmeistaraútbúgvingini ella maskinistútbúgvingini kann fáa upp til 6 mánaðar av starvsvenjingartíðini á góðkendum virki á landi.



*Strandferðslan er millum reiðaríini, sum samstarva við Vinnuháskúlan um at taka navigatøraspirantar í starvsvenjing. Ætlandi fer almenna reiðaríið eisini at taka ímóti maskinmeistaraaspirantunum*

inn á aspirantútbúgvingina til maskinmeistara. Tí tað gerst støðugt truplari at fáa siglingartíð orsakað av, at flotin er so nógv minkaður seinastu árini. Ikki bara í Føroyum, men eisini í londunum rundan um okkum.

– Í tann mun, tað er gjørligt, royna vit at finna praktikkpláss til næmingarnar. Tað skulu sjálvsagt vera góðkend praktikkpláss. Skipini skulu lúka nøkur krøv, bæði viðvíkjandi stødd, maskinorku og hvussu virksemið umborð er skipað.

– Við navigatørunum gjørdu vit samstarv við nøkur útvald føroysk reiðarí, sum vit kendu frammanundan, og sum eisini vóru við í fyrireikingini at snikka aspirantskipanina hjá navigatørunum saman. Vit hava eisini spurt tey og eisini nøkur virki á landi um samstarv í sambandi við maskinmeistaraaspirantarnar, og afturmeldingarnar hava allar verið positivar, sigur Wilhelm E. Petersen.

Hann sigur, at samband eisini er við útlendsk reiðarí, sum hugsanin er at fáa inn í skipanina, so hvørt sum fleiri aspirantar koma til.

## Væl umtókt útbúgving

Stígur er í frálandavinnuni um allan heim orsakað av lága oljuprísinum, og tað hevur elvt til økt arbeiðsloysi millum navigatørar. Eisini maskinmeistarar hava mist arbeiði á sjónum, men teir eru so eftirspurdir í at kalla øllum vinnugreinum, at teir verða ikki arbeiðsleysir.

– Maskinmeistaraútbúgvingin er ekstremt populer her, í Danmark og aðrastaðni, bæði hjá teimum, ið taka útbúgvingina og ikki minni hjá vinnuni, tí útbúgvingin ger, at maskinmeistarar eru ógvuliga fleksiblir og kunnu brúkast til rættiliga nógvar funksjónir. Tað er altíð ein fyrimunur, men serliga er tað ein fyrimunur, tá tað sansar at í summum vinnum, og nógv annars eru í vanda fyri at missa arbeiðið.

– Annars eru bæði maskinmeistaraútbúgvingin og navigatørútbúgvingin uppløgd fyri fólk, sum ynskja sær eina maritima útbúgving við ríkum møguleikum, men í fyrsta umfari ikki ynskja sær eina akademiska útbúgving, sigur Wilhelm E. Petersen.

## Helvt um helvt

Umleið 30 næmingar verða árliga upptiknir til skiparaútbúgvingina á Vinnuháskúlanum, og umleið ein triðingur av hesum hevur valt aspirantleiðina, síðan hon gjørdist møgulig í 2015.

Wilhelm E. Petersen væntar nøkulunda somu gongd við aspirantútbúgvingini til maskinmeistara. Seinastu árini hevur tilgongdin av maskinmeistaralesandi verið hægri enn hjá navigatørum.

– Tað hóskar væl, at býtið millum aspirantnæmingar og næmingar á vanligu útbúgvingini er á leið helvt um helvt, sigur hann.

– Í løtuni er størri tilgongd til maskinmeistaraútbúgvingina enn til skipsførara. 22 maskinmeistaranæmingar vóru tilteknaðir at byrjað eftir summarferiuna, men talið av skipsføraranæmingum var bara ein helvt av hesum. Søguliga síggja vit eisini hesa gongdina, tá vit hava hákonjunktur, tí navigatørnæmingarnir verða í størri mun enn maskinmeistaranæmingarnir rekrutteraðir úr fiskivinnuni. Og tá tað gongur væl har, so er hugurin størri at tjena sær nøkur eyka oyru, áðrenn farið verður á skúla, staðfestir Wilhelm E. Petersen.

Higartil hevur SIT-prógv givið atgongd til maskinmeistaraútbúgvingina. Men tann skipanin er ikki heilt í samsvar við ásetingarnar í "Kunngerð um maskinmeistaraútbúgving", har tað stendur soleiðis um upptøku til útbúgvingina:

§ 5. Fyri at verða tikin upp á maskinmeistaraútbúgvingina, skal umsøkjari í minsta lagi hava
1) fráfaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum føroyskum, donskum, enskum, alisfrøði, evnafrøði og støddfrøði við í minsta lagi próvtalinum 6 í hvørjari lærugrein og vera
2) maskinsmiður ella hava samsvarandi yrkisútbúgving innan jarn– ella maskintøkni.
Stk. 2. Skúlastjórin kann taka umsøkjara upp, hóast hesin ikki lýkur ásettu upptøkutreytirnar í stk. 1, um so er, at umsøkjari hevur aðra yrkisútbúgving við ískoytisútbúgving og starvsvenjing, sum samanumtikið kann metast javnt við upptøkutreytirnar í stk. 1, og skúlastjórin annars metir, at umsøkjarin er førur fyri at taka útbúgvingina til ásettu tíðina.

Upptøkan av SIT'arum er hend sum undantak sambært stk. 2, men fram eftir verða næmingar, sum ikki lúka upptøkutreytirnar í stk. 1 upptiknir sum aspirantar í staðin.





**– Maskinmeistaraútbúgvingin er ekstremt populer her, í Danmark og aðrastaðni, bæði hjá teimum, ið taka útbúgvingina og ikki minni hjá vinnuni, tí útbúgvingin ger, at maskinmeistarar eru ógvuliga fleksiblir og kunnu brúkast til rættiliga nógvar funksjónir.**

Wilhelm E. Petersen



*SEV telist millum tey stóru arbeiðsplássini á landi, sum kunnu góðkennast at bjóða maskinmeistaraaspirantum í starvsvenjing*

# Nógvir maskinmeistarar arbeiða í landi

**Av teimum 720 limunum í Maskinmeistarafelagnum arbeiða lutfalsliga nógvir í landi, 122 í alt**

**TEKSTUR:**
Grækaris Djurhuus Magnussen, PRESS

Eitt yvirlit hjá Maskinmeistarafelagnum vísir, at 122 limir í felagnum arbeiða í landi. Teir flestu arbeiða hjá kommunum og í interkommunalum feløgum sum til dømis SEV. Í hesum feløgum arbeiða 90 maskinmeistarar.

Fleiri maskinmeistarar arbeiða eisini hjá privatum fyritøkum, og yvirlitið hjá Maskinmeistarafelagnum vísir, at har starvast 32 av limum felagsins. Felagið hevur 30 limir, sum ikki eru skrásettir.

Nógv flestu maskinmeistararnir, sum eru limir í Maskinmeistarafelagnum, arbeiða framvegis á sjónum. Nógv teir flestu sigla við fiskiskipum, 260 í alt. Við handilsskipum sigla 129, og 38 av limum felagsins sigla við almennum føroyskum skipum, tað er til dømis hjá Strandfaraskipum landsins og Vørn.







***Grafarnir vísa, hvar limirnir hjá Maskinmeistarafelagnum arbeiða.***
*Grafikkur: Maskinmeistarafelagið*



*S/S Bjørn flaggskrýddur.*
*Mynd: Heimasíðan hjá S/S Bjørn*

# Sett gamlan dampara í stand

**Føroyski maskinmeistarin, Klæmint Jacobsen, hevur saman við donskum arbeiðsmonnum sett ein gamlan dampara í stand seinastu árini. S/S Bjørn, sum damparin eitur, er í dag eitt væl dámt ferðamál hjá bæði bæði dønum og útlendingum**

**TEKSTUR:** Grækaris Djurhuus Magnussen, PRESS

Hann hevur siglt og arbeitt sum maskinmeistari í út við 60 ár, 78 ára gamli Klæmint Jacobsen í Havn. Seinasta túrin til skips gjørdi hann fyri hálvum ári síðani, tá hann var maskinmeistari á einum av skipunum hjá Thor í Hósvík.

Hóast hann hevur starvast sum maskinmeistari øll hesi árini, bæði til skips og í landi, hevur hann givið sær stundir til frítíðarítriv. Eitt av hesum ítrivum hevur verið at sett gamla danska damparan, S/S Bjørn, í stand. Tað hevur hann gjørt, tá hann hevur havt frí seinastu tólv árini.

## Gamlir vinmenn

Í 1954 fór Klæmint Jacobsen í læru sum maskinsmiður á Skála skipasmiðju. Um sama mundið byrjaði ein annar ungur maður í læru á Skála skipasmiðju, og hetta var Harald Thomsen, sum hevur ættarbond á Langasandi, og sum vaks upp saman við familju síni á Strondum. Klæmint og Harald gjørdust góðir vinmenn, og góða vinarlag teirra hevur vart øll hesi árini.

Harald Thomsen flutti fyri mongum árum síðani til Danmarkar at búgva, og her kom hann í samband við sjakkið, sum fór undir at umvæla S/S Bjørn. Harald Thomsen gjørdist soleiðis ein fastur partur av hesum sjakkinum. Á einari av vitjan sínari hjá Haraldi Thomsen, gjørdist eisini Klæmint Jacobsen partur av umvælingarsjakkinum hjá S/S Bjørn, og hann helmaði ikki, fyrr enn skipið var liðugt umvælt.

Framhald á næstu síðu >>



*Klæmint Jacobsen, maskinmeistari, hevur seinastu árini verið partur av einum sjakki, sum hevur umvælt gamla danska damparan, S/S Bjørn. Mynd: Grækaris D. Magnussen*

> **”S/S Bjørn er snøgt sagt í sama standi í dag, sum tá hann varð smíðaður í 1908“**
>
> Klæmint Jacobsen

## S/S Bjørn

S/S Bjørn er ein gamal sleipibátur og ísbrótari. Hann varð smíðaður í 1908 til havnamyndugleikarnar í Randers. Báturin var í sigling heilt fram til 1981, tá felagið fyri Varveiting av gomlum skipum yvirtók hann fyri 72 krónur. Treytin var, at skipið varð umvælt og sett í upprunaligan stand. Umvælingin hevur tikið út við 30 ár, og tað er sonevndi „Bjørnebanden“, sum sjálvboðin – ella sjálvbodnir – hava tikið sær av umvælingararbeiðinum. Hetta eru alt tilkomnir menn, flestu teirra pensjónistar. Talan er um gamlar sjómenn, smiðir, skipstimbrarar, maskinmeistarar, skipsverkfrøðingar og líknandi.

Í umvælingararbeiðinum hevur dentur verið lagdur á at gera skipið út við upprunaligu




*S/S Bjørn við bryggju í Randers. Tað var her, teir fingu nógv saknaðu skipsklokkuna*



*Partur av maskinrúminum á S/S Bjørn. Ovast á myndini síggja vit regulatorin. Mynd: Klæmint Jacobsen*



*Ein av maskinmeistarunum kannar maskinuna. Myndaánari: Klæmint Jacobsen*



*Sjakkið ella „Bjørnebanden", sum hevur umvælt S/S Bjørn. Her eru teir avmyndaðir framman fyri verkstaðið, sum teir hava brúkt í umvælingararbeiðinum. Klæmin Jacobsen stendur sum nummar 6 úr vinstru síðu í fremru røðini. Við síðuna av honum, vinstrumegin, stendur vinmaður hansara, Harald Thomsen. Myndaánari: Klæmint Jacobsen*

**"Frálíka saman-sjóðingin hevur gjørt sítt til, at endaliga úrslitið av umvælingini gjørdist so gott"**

Klæmint Jacobsen

útgerðini, og at endurskapa skrokkin, maskinuna, ketilin og apteringina. Hetta hevur sett stór krøv til upprunaliga handverkið, sum ikki hevur verið brúkt í mong ár. Samstundis hava hesir menninir, teirra millum Klæmint Jacobsen og Harald Thomsen, gjørt gamla damparan til eina livandi ídnaðarsøgu.

## Í ferðavinnuni

Í dag siglir S/S Bjørn við ferðafólki. Hann er heimahoyrandi í Helsingør. Arbeiðið, sum gjørt verður í dag, er framvegis sjálvboðið. Maskinmenn og aðrir yvirmenn hava útvegað sær neyðugu pappírini av nýggjum, fyri at hava loyvi at sigla við damparanum.

Klæmint Jacobsen greiðir frá, at damparin er allur umvældur sum hann er. Til dømis er dekkið skift út, lúnningarnar eru umvældar, apteringin er umvæld og endurskapað og so framvegis.

– S/S Bjørn er snøgt sagt í sama standi í dag, sum tá hann varð smíðaður í 1908. Dampmaskinan er eisini umvæld úr enda í annan, og í dag siglir hann aftur sum kolfýrdur dampari. Tað einasta, sum vit ikki funnu í umvælingararbeiðinum, var skipsklokkan, og tað vóru vit harmir um, sigur Klæmint Jacobsen.

## Hátíðarhald í Randers

Til eitt hátíðarhald hjá havnamyndugleikunum í Randers, gjørdi skjakkið handan S/S Bjørn av at fara á vitjan við damparanum. Í Randers frættu tey um komandi vitjanina. Tey settu seg í samband við menn á S/S Bjørn, og bjóðaðu teimum at vera meira enn vælkomnar til Randers. Boðað varð eisini frá, at tey høvdu eina spennandi gávu at geva teimum.

– Tá vit komu til Randers við damparanum, komu tey umborð við gávuni. Tá var tað onki minni enn upprunaliga skipsklokkan av S/S Bjørn. Tey høvdu goymt hana í mong ár, og nú fingu vit hava aftur. Tað vóru vit ómetaliga fegnir um, sigur Klæmint Jacobsen.

Hann er fegin um hesi tólv árini, hann hevur verið partur av umvælingarsjakkinum.

– Vit hava arbeitt upp eitt veldugt vinarlag, og hetta hevur sum heild verið bæði spennandi, avbjóðandi og stuttligt. Til dømis hevur sjakkið gjørt fleiri útferðir og skipað fyri ymsum felags tiltøkum. Frálíka saman-sjóðingin hevur gjørt sítt til, at endaliga úrslitið av umvælingini gjørdist so gott, heldur Klæmint Jacobsen.












*Páll og Flykra ganga nógvar góðar túrar saman, og nú pensjónstilveran stendur í durunum, verða helst stundir til enn fleiri*

# Pensjónslívið fyri framman – hundurin gleðir seg

**Í seinasta mánaða fór formaðurin í Maskinmeistarafelagnum um tey sjeyti, og nú formansskeiðið brátt er runnið, gleðir hann seg til pensjónstilveruna.**

**TEKSTUR & MYNDIR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

20. november fylti Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, 70, og tá árligi aðalfundurin í felagnum verður í mars, rennur hetta formansskeiðið hjá honum eisini út.

Nú er tilveran sum pensjonistur fyri framman, og tó at Páll Hansen ikki hevur so nógv frítíðarítriv at hugsavna seg um, so óttast hann ikki fyri at fara at keða seg.

Nú verða betri stundir til unnustuna, og ein annar, sum heilt vist fer at njóta gott av, at formaðurin í Maskinmeistarafelagnum fær stundir til fleiri spákingartúrar runt um í Havnini í gerandisdegnum, er hundurin Flykra, sum er av fínari cavalier king charles spaniel-ætt.

– Flykra gleðir seg kanska allarmest, heldur Páll skemtandi.

## Hjá SEV í 38 ár

Í tíggju ár hevur Páll Hansen sitið í formanssessinum í Maskinmeistarafelagnum. Hann arbeiddi hjá SEV, tá hann varð valdur, og tey fyrstu árini var formansstarvið parttíðarstarv. Men á aðalfundinum í mars 2011 varð samtykt, at formaður felagsins árið eftir skuldi vera fastløntur fulla tíð.

Tá fór hann í farloyvi frá SEV, men fór ongantíð aftur til arbeiðis har, tí pensjónsaldurin varð rokkin, meðan hann enn sat tryggur í formanssessinum.

Páll Hansen starvaðist hjá SEV í samfull 38 ár, øll árini sum vaktmeistari á Sundsverkinum.

## Elektrikari

Hann er annars havnamaður við stórum H, føddur og uppvaksin í Hornabø. Eftir sjey ára skúlagongd í Nonnuskúlanum gekk hann í eitt ár til handa í smiðjuni hjá Tórshavnar Kommunu, áðrenn hann sum bara 15 ára gamal fór í læru sum elektrikari hjá Einar Mikkelsen.

Øll læruárini arbeiddi hann við elinnlegging á Landssjúkrahúsinum, sum varð nógv útbygt í fyrru helvt av 1960-árunum.

*Framhald á næstu síðu >>*

### Til skips

Eftir lærutíðina arbeiddi Páll ongantíð aftur sum vanligur elektrikari. Tá lærutíðin var av á sumri 1967 fór hann á sild við skonnartini St. Jack tað summarið. Hann tók síðani fyrireikandi skeið til maskinmeistaraútbúgvingina, men fór so aftur til skips og var við línuskipunum Leivi Hepna og Gracie til fiskiskap í Grønlandi, New Foundlandi og heilt uppi í St. Lawrence-flógvanum.

Í januar 1970 fór hann á verkstaðið hjá Tórshavnar Skipasmiðju í níggju mánaðir at fáa sær smiðjutíð. Síðani var hann aftur við Gracie í nakrar mánaðir, áðrenn hann byrjaði á Maskinmeistaraskúlanum í 1971.

Tá hann var liðugur við vanligu maskinmeistaraútbúgvingina, sum tá var, fór hann at sigla sum juniormeistari við hjá danska reiðarínum Ove Skou.

Hann sigldi við spildurnýggja stykkjagóðsskipinum Dorit Skou í átta mánaðir, og skuldi so fara undir at taka víðkaðu maskinmeistaraútbúgvingina á Københavns Maskinmesterskole.

### Aftur til SEV

Men tá var hann biðin um at koma at arbeiða hjá SEV í nakrar mánaðir. Sundsverkið var tá í ger. Teir fáu mánaðirnir blivu tó til tvey ár.

Miðskeiðis í 1970-árunum tók hann loksins víðkaðu maskinmeistaraútbúgvingina í Keypmannahavn og fór síðani aftur til SEV, har hann síðani arbeiddi restina av sínum virkna arbeiðslívi sum maskinmeistari.

Páll Hansen bleiv longu í 1984 valdur í nevndina hjá Maskinmeistarafelagnum fyrstu ferð. Innan tað hevði hann eitt tíðarskeið verið felagsálitismaður hjá maskinmeistarunum hjá SEV. Hann sat í nevndini í tíggju ár, men fór so úr í nøkur ár. Í 2001 varð hann aftur valdur í nevndina og bleiv so formaður í 2007.

### Fingu sáttmála

Størstu frambrotini í sínum virkna fakfelagslívi hendu í tíðini sum felagsálitismaður, heldur Páll.

– Tá fingu vit eftir tógvi stríð egnan sáttmála. Undan tíð arbeiddu maskinmeistararnir hjá SEV fyri hondverkaraløn, men høvdu ongan sáttmála, sigur hann.

Tey skjótt 11 árini, hann hevur sitið sum formaður, hava tó eisini verið avbjóðandi við nógvum týðandi samráðingum og orrustum, bæði mótvegis reiðaríum, arbeiðsgevarum á landi og almennum myndugleikum.

## FORMANSVAL FYRI FRAMMAN

**Á ársaðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum í mars 2018 verður formansval á skránni umframt val av tveimum nevndarlimum.**

**Páll Hansen, sum hevur verið formaður felagsins í 11 ár, tá formansskeiðið rennur út í mars, hevur boðað frá, at hann tekur ikki við afturvali.**

**Freistin at stilla fólk upp til formansval og nevndarval er 15. desember. Allir limir í felagnum kunnu stilla upp til nevndarval, men formansvalevni skulu umframt at vera limir í Maskinmeistarafelagnum eisini hava útbúgving sum maskinmeistarar.**

**Formaðurin verður valdur fyri eitt trý ára skeið og tekur við starvinum sum fulltíðarsettur formaður. Formaðurin verður løntur sambært lønartalvuni fyri maskinmeistarar í starvi hjá tí almenna á landi íroknað eftirløn. Eisini fær formaðurin viðbót, sum saman við lønarstigi verður ásett av nevndini.**






# SKEMT og viðmerking

ØSSUR WINTHEREIG, PRESS

Í svenska blaðnum „Sjöbefälen", ið er blaðið hjá svensku yvirmonnunum, var hendan tekningin í septemberblaðnum.

Mikael Huss, sum er ábyrgdarblaðstjóri á blaðnum sigur, at hendan tekningin skal vísa, at fakfelagið hevur sum grundsjónarmið, at svensk fløgg skulu veitra afturi á hekkuni á øllum skipum, sum svenskarar eiga og svenskarar sigla við.

– Tað er tað einfaldasta fyri okkum. Men veruleikin er ein annar, og reiðarar leita eftir einfaldari og bíligari loysnum. Har er útflagging ein.

Hann sigur, at svenska fakfelagið heldur tað vera syndarligt, at svensk skip flagga út, men felagð hevur eisini nøkur krøv til tey, sum flagga út.

Hann vísir á fýra høvuðskrøv, sum svenska fakfelagið hevur mótvegis teimum reiðaríðum, sum flagga út:

1) Vit vilja, at øll manningin fær møguleikan at fylgja við – uttan mun til hvat fyri flagg farið verður undir.

2) Vit vilja vera við í avtalunum, soleiðis at tey av manningini, sum fylgja við, fáa setanar– og lønartreytir, sum minna um treytirnar, ið eru undir svenskum flaggi.

3) Hýran skal roknast soleiðis, at manningin fær somu upphædd útgoldna, sum hon fekk áðrenn.

4) Tryggingar og pensjónsviðurskifti skulu vera so eins, sum til ber.

– Í okkara avtalum við FAS í Føroyum liggur nógv eykaarbeiði at halda skil á nýggjum lønartalvum og trupult er eisini at fáa tryggingarviðurskiftini upp á pláss, sigur Mikael Huss.

Hans Johannes á Brúgv stjóri á FAS í Føroyum sigur seg ikki kennast við teir trupulleikarnir, sum Mikael Huss nevnur.

– Spurningurin um manning hevur ikki so nógv ið FAS at gera. Svensku reiðararnir avgera sjálvir, hvør siglur við skipunum, sigur Hans Johannes á Brúgv.



# *FØÐINGARDAGAR Maskinmeistarafelagið:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Páll J. Hansen | Tórshavn | 20/11-1947 | 70 ár |
| Óli J. Olsen | Fuglafjørður | 29/12-1947 | 70 ár |
| Anfinn Eli Dam | Kollafjørður | 4/11-1957 | 60 ár |
| Bjarki Magnussen | Húsavík | 12/11-1957 | 60 ár |
| Hans Jákup Hvidbro | Viðareiði | 25/11-1957 | 60 ár |
| Pauli Debes | Tórshavn | 11/12-1957 | 60 ár |
| Hans Jacob Olsen | Toftir | 19/1-1958 | 60 ár |
| Fróði Davidsen | Saltangará | 10/11-1967 | 50 ár |
| Jón Næs | Tvøroyri | 22/11-1967 | 50 ár |
| Hans Jákup Berg Hansen | Tórshavn | 29/12-1967 | 50 ár |
| Heðin Joensen | Tvøroyri | 30/12-1967 | 50 ár |
| Bogi Jacobsen | Tórshavn | 11/2-1968 | 50 ár |
| Hanus Martin Olsen | Nes, Eysturoy | 8/11-1977 | 40 ár |
| Bjørn Holm | Tórshavn | 28/11-1977 | 40 ár |
| Jógvan Heinesen | Norðragøta | 8/12-1977 | 40 ár |
| Theodor Thomassen | Tórshavn | 1/2-1978 | 40 ár |
| Daniel Nielsen | Tórshavn | 1/11-1987 | 30 ár |
| Kaj Vilhelm Meyer | Trongisvágur | 16/11-1987 | 30 ár |
| Dan Eyðuns. Andreasen | Leirvík | 20/11-1987 | 30 ár |
| Andrias D. B. Joensen | Leirvík | 6/1-1988 | 30 ár |
| Kristian B. Andreasen | Klaksvík | 24/2-1988 | 30 ár |
| Sam Jacobsen | Norðragøta | 24/2-1988 | 30 ár |





# Frá Maskinmeistarafelagnum

**18-08-2017. MF.**
Nevndarfundur. Skriva upplegg til komandi lønarsamráðingar og gjøgnumgingið øll uppskot, sum vóru komin inn.

**31-08-2017. MF.**
Nevndarfundur. Enn ein gjøgnumgongd av sáttmálaupplegginum til FMR. Her eru vit mest sum komnir á mál.

**11-09-2017.**
Boða FMR frá, at vit eru tilreiðar til samráðingar og ynskja at byrja hesar áðrenn 1. oktober.

**13-09-2017. MF.**
Blaðfundur. Eftirmeta síðsta blað, og avtala greinar til komandi blað. Nevndarfundur. Høvuðsevnið á hesum fundi var at viðgera sáttmálakrøv til KAF.

**22-09-2017. MF.**
Kunningartiltak hjá Fasta Gerðarrætti. Alfred Petersen, nevndarformaður, bjóðaði vælkomin. Kristoffur Laksá og Páll Nielsen umrøddu søguligu gongdina viðvíkjandi trætum á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Teir lýstu nøkur áhugaverd mál í sambandi við arbeiðsrætt í Føroyum. Hanna Vang, rættarformaður, greiddi frá málsviðgerð og mannagongdum í Fasta Gerðarrætti. Ein sera áhugaverdur fundur við góðum kjaki.

**25-09-2017 MF.**
Vóru og heilsaðu uppá í samband við at Smyril line hevur fingið nýggjan starvsfólkaleiðara. Hesin var og vitjaði saman við einum starvsfelaga. Sera hugnaligur og góður fundur, har tosað varð um viðurskifti, sum báðir partar hava áhuga í.

**28-09-2017. Als-húsið.**
Fundur í Trygdargrunninum. Kunnað varð um gongdina higartil í ár, og samsvarar hon væl við tað, man hevði roknað við við ársbyrjan.

**29-09-2017. MF.**
Nevndarfundur. Høvuðsevnið á hesum fundi var at viðgera sáttmálakrøv til FMR og KAF. Tosað varð um mannagongdir hjá SEV í sambandi við starvssetanir.

**18-10-2017. Smæran.**
Partaeigarafundur í Lív. Stjórin kunnaði um hálvársroknskapin, og nevndarformaðurin kunnaði um íløgustrategi felagsins. Tosað varð eisini um millum annað viðgerðartrygging, óarbeiðsføristryggingar og trygging í samband við hættisligar sjúkur.

**26-10-2017. Fiskimálaráðið.**
Fiskimálaráðharrin beyð vælkomin og kunnaði um lóg um ásetan av veiðugjaldi. Lógin verður send út til hoyringar. Starvsfólk kunnaði síðani um, hvussu lógin skuldi skiljast. Á fundinum vóru manningarfeløgini, arbeiðarafeløg og Meginfelag útróðrarmanna. Umboð fyri taks vóru eisini við.

**27-10-2017. MF.**
Nevndarfundur. Tvey mál vóru til kunningar. Umboð fyri LÍV kunnaði um okkara avtalu um hættisligar sjúkur. Hendan avtalan skal endurskoðast. Til støðutakan vóru eisini nøkur mál, sum øll høvdu okkurt við komandi sáttmálasamráðingar at gera.

**Vinnuháskúlin.**
**Fundur í útbúgvingarráðnum.**
**30-og 31-10-2017. NMF.**
Fundurin hesaferð varð hildin í Nyneshamn, sum liggur 100 kilometrar sunnanfyri Stokkhólm. Tvey umboð fyri hvørt landið vóru møtt. Vit kunnaðu í okkara landarapport millum annað um limatalið, sum nú er 720 í alt, 589 virknir limir og 131 hvílandi limir. Eitt yvirlit yvir sáttmálarnar varð eisini lagt fram og kunnað varð um komandi broytingar í Grønlandi. Nomið var eisini við smávegis trupulleikar við ITF-inspektørum. Her vístu vit á, at høvuðsskrivstovan hjá ITF í London ger ov lítið av at kunnað sínar inspektørar.

Øll feløgini boðaðu frá, at so at siga onki arbeiðsloysi er millum limirnar hjá feløgunum í Skandinavia.




# Lat okkum hjálpa tær at seta saman fíggjarliga trygdarnetið, so hongur tað ikki á tær

Kundin eigur LÍV. Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo